FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

J&K Petersen
á Hjalla 13
188 Hoyvík

Tinganes, 15. juli 2021
Málsnr.: 21/09718

<u>Viðvíkjandi kæru um undangóðkenning til Fámjinstunnilin</u>

Víst verður til kæru tykkara, dagfest 21. mai 2021, har kært verður um, at Landsverk ikki vil taka umsókn tykkara um undangóðkenning til Fámjinstunnilin til ummælis, sum var latin inn tann 17. mai 2021 kl. 11:18, hóast freistin at lata umsókn inn var 17. mai 2021 kl. 9:00.

Í fyrsta lagi heitir J&K Petersen á viðkomandi myndugleika um at taka avgerð um, at Landsverk skal taka umsóknina hjá J&K Petersen um undangóðkenning til Fámjinstunnilin til ummælis.

Í øðrum lagi heitir J&K Petersen á viðkomandi myndugleika um at vísa avgerðina hjá Landsverki aftur til endurnýggjaða viðgerð.

Í triðja lagi verður gjørt galdandi, at grundgevingarnar hjá Landsverki í formligu niðurstøðuni ikki kunnu bera ta avgerð, sum stovnurin hevur tikið.

Avgerðin hjá Landsverki verður *ógildað.*

*Málslýsing*
Tann 14. apríl 2021 heitir Landsverk á fyritøkur um at søkja um undangóðkenning til nýggjan Fámjinstunnil.

Í skrivinum, sum finst á heimasíðuni, er m.a. ein lýsing av uppgávuni, ein tilvísing um, hvar undangóðkenningartilfarið finst, umsóknarfreist, úrvalstreytir til umsøkjara og krøv annars til umsóknina.

Undir yvirskriftini *"Umsóknarfreist og innlatingar bústaður"* stendur við stórari skrift mitt fyri, at seinasta freist at lata inn umsókn til undangóðkenning er:

*"Hósdagin 13. mai 2021, kl. 14.00".*

Í skrivinum verður somuleiðis kunnað um, at: *"Umsóknir, sum koma inn eftir hesa freist, verða ikki tiknar við til metingar."*

Tann 10. mai 2021 broytir Landsverk freistina fyri, nær umsóknirnar í seinasta lagi skulu verða Landsverki í hendi. Freistin verður broytt til mánamorgun 17. mai 2021 kl. 9. Kunnað verður um hetta umvegis samskiftispallin, iBinder. Landsverk skrivar soleiðis á iBinder:

*"KUNNING – Eftirsum hósdagur er frídagur, og fleiri taka sær frí fríggjadagin, havi eg valt at flyta freistina til mánadagin kl 9...."*

Landsverk viðmerkir eisini, at fyritøkur kunnu lata tilfarið inn, áðrenn ásettu freistina.

17. mai 2021 kl. 11:18 verður umsókn hjá J&K Petersen um undangóðkenning til Fámjins tunnilin umframt fylgiskjøl send Landsverki umvegis teldupost. Umsóknin verður send til Landsverk orsakað av, at samskiftisportalurin, iBinder, har umsóknir skuldu latast inn ígjøgnum, var latin aftur, tí at freistin var farin.

Kl. 11:41 sama dag váttar Landsverk fyri móttøku av umsókn frá J&K Petersen, men vísir á, at umsóknin er móttikin ov seint í mun til ásettu freistina kl. 9:00. Víðari vísir Landsverk á, at stovnurin fer at viðgera innanhýsis, um umsóknin frá J&K Petersen kann koma við í metingina saman við hinum umsóknunum, hóast ov seina innlating av umsókn.

Kl. 14:38 sama dag sendir stjórin á J&K Petersen ein teldupost til Sigurð Lamhauge, stjóra á Landsverki, har greitt verður frá, at talan er um eitt menniskjaligt mistak. Orsøkin til mistakið er, at J&K Petersen ikki hevur givið sær far um, at freistin at lata inn umsókn er broytt frá hósdegi kl. 14:00 til mánamorgun kl. 9:00, samstundis sum tvær ymiskar freistir eru ásettar í sama teigi á iBinder. Talan er um freist fyri avhending og freist fyri revisiónir:

*"Avhendingarfreist: 17-05-2021 09:00" og "Revisiónir 6 12-05-2021 14:01".*

Tí heitir stjórin á J&K Petersen á Landsverk um at taka atlit til, at umsóknin varð móttikin ov seint orsakað av einum menniskjaligum mistaki.

Tann 19. mai 2021 boðar Landsverk, umvegis teldupost, J&K Petersen frá, at umsókn teirra um undangóðkenning til nýggja farleið til Fámjin ikki verður tikin við í víðari tilgongdini. Víst verður á, at tá freistin var farin kl. 9, var ongin umsókn móttikin umvegis iBinder frá J&K Petersen.

Seinni um kvøldið heitir J&K Petersen á Landsverk, umvegis teldupost, um at koma við einari formligari avgerð í málinum. J&K Petersen vísir í teldupostinum á, at felagið í fleiri umførum hevur verið undangóðkent til slíkar verkætlanir, m.a. til verkætlanina viðvíkjandi Tunlunum norður um Fjall. Tí metir J&K Petersen, at undangóðkenningin av felagnum til verkætlanina til at gera tunnil til Fámjin er at metast sum ein formsak.
Somuleiðis vísir felagið á, at Landsverk av sínum eintingum tók avgerð um at broyta freistina fyri innlating av umsóknum til mánamorgun kl. 9.00. Málsviðgerin hjá J&K Petersen gekk út frá, at hendan freistin var kl. 14.00, eins og hon var í undanfarnu tíðarfreistini. Tískil hendi ein feilur, og tilfarið frá J&K Petersen varð latið Landsverki 2 tímar ov seint.
J&K Petersen vísir víðari á, at sambært advokati teirra, so *"eru ongar formligar reglur galdandi í samband við eina prækvalifikatión"*, og at *"tað framgongur av heilt vanligum umsitingarligum reglum, at ein almennur myndugleiki altíð kann síggja burtur frá eini freist, sum er ásett reint fyrisitingarliga"*.

Niðurstøðan í skrivinum hjá J&K Petersen er, at Landsverk átti at longt freistina mánadagin

tann 17. mai kl. 9:00, tí talan bert er um eitt bagatelfrávik havandi í huga, at Landsverk átti at verið áhuga í, at fingið so nógvar undangóðkendar veitarar sum møguligt fyri at tryggja veruliga kapping og so lágan kostnað fyri tað almenna sum gjørligt.

Tann 20. mai kemur Landsverk við einari formligari niðurstøðu um, at umsóknin hjá J&K Petersen ikki er partur av víðari tilgongdini. Víst verður til, at tá umsóknarfreistin var farin 17. mai kl. 9:00, var ongin umsókn frá J&K Petersen móttikin á samskiftispallinum, iBinder. Somuleiðis verður víst til punkt 3, síðsta punkt í útboðsbrævinum, har tað stendur, at:

> *"Umsóknir, sum koma inn eftir hesa freist, verða ikki tiknar við til metingar."*

Tann 21. mai sendir J&K Petersen eina kæru til Fíggjarmálaráðið, har kært verður um avgerðina hjá Landsverki.

*Viðmerkingar frá pørtunum*
Kæran og viðmerkingar hava verið til hoyringar hjá pørtunum.

*Tíðarfreist og undangóðkenning*
Landsverk greiðir frá, at tann 10. mai 2021 broytir stovnurin tíðarfreistina fyri, nær umsóknirnar viðvíkjandi undangóðkenning til Fámjinstunnilin skulu latast inn. Orsøkin til broytingina er, at Landsverk leggur til merkis, at ásetta freistin er ein heiligdagur. Freistin verður broytt frá 13. mai 2021 kl. 14:00 til 17. mai 2021 kl. 9:00. Landsverk greiðir frá, at henda broytingin sæst, sum tað fyrsta, tá ritað verður inn á eitt ítøkiligt útboð. Broytingin verður eisini fráboðað í skiljiblaðnum "Spurningar og svar" inni á iBinder, samstundis sum kunnað verður um broytingina umvegis teldupost gjøgnum skipanina á iBinder. Tí metir Landsverk, at kunningin viðvíkjandi broytingini av tíðarfreistini í ítøkiligu undangóðkenningini hevur verið greið, og at Landsverk orsakað av hesum ikki kann koma til aðra niðurstøðu enn at útihýsa umsóknina frá J&K Petersen. Somuleiðis vísir Landsverk á, at talan bert var um broytingar í tíðarfreistini, og onki grundarlag er fyri at halda, at aðrar treytir hesum viðvíkjandi eru broyttar ella falnar burtur.

Landsverk vísir víðari á, at í sambandi við eina undangóðkenning verða ávís minstukrøv sett, sum allar fyritøkur skulu lúka. Hetta eru m.a. krøv til tíðarfreist og innlating av umsókn á røttum staði. Um umsøkjari ikki livir upp til hesi krøv, verður ein møgulig umsókn ella tilboð havnað ella ikki tikin við til metingar. Landsverk metir ikki, at J&K Petersen hevur lokið hesi minstukrøv. Tá ið freistin at lata umsókn inn var farin, hevði Landsverk onga umsókn móttikið gjøgnum samskiftispallin, iBinder. Landsverk greiður frá, at hetta eisini er orsøkin til, at umsóknin frá J&K Petersen ikki verður tikin við í víðari tilgongdini. Landsverk metir, at tá talan er um ein professionellan aktør, sum J&K Petersen, og sum somuleiðis er vanur við at luttaka í undangóðkenningum og útboðum hjá Landsverki, umframt at J&K Petersen er ein royndur brúkari av iBinder, so er tað ábyrgdin hjá J&K Petersen at halda tey ásettu minstukrøvini. Harumframt hevur J&K Petersen váttað, at teir hava gjørt ein menniskjaligan feil, sum teir sambært galdandi rætti bera ábyrgdina fyri. Landsverk metir tískil, at ábyrgdin liggur hjá J&K Petersen at syrgja fyri, at umsóknin er latin inn til ásettu tíðarfreist og á røttum staði.

J&K Petersen greiðir frá, at teir ikki meta, at Landsverk hevur tilskilað nóg greitt, hvørjar avleiðingarnar vóru, um ein umsókn varð latin inn eftir, at freistin var farin, tí at í upprunaligu freistásetingini í undangóðkenningarskrivinum, sum var tann 13. mai 2021 kl. 14:00, er hetta viðmerkt við stórum bókstavum mitt fyri á síðuni. Somuleiðis verður tilskilað á undangóðkenningarskrivinum, at umsóknir, sum koma inn eftir ásettu freistina, ikki verða tiknar við til ummælis. Tá henda freistin verður broytt av Landsverki, verður freistin ikki tilskilað á ein øðrvísi hátt, eins og tað varð gjørt við undanfarnu freistásetingina.
Víðari greiðir J&K Petersen frá, at Landsverk heldur ikki hevur tilskilað í sambandi við broyttu freistásetingina, at avleiðingarnar av, at umsóknir verða latnar inn ov seint ikki verða tiknar við til metingar. Somuleiðis varð samskiftisportalurin, iBinder, stongdur, tá freistin var farin kl. 9:00, og tískil hevði J&K Petersen ikki annan møguleika enn at lata umsóknina inn umvegis teldupost til Landsverk.

J&K Petersen vísir eisini á, at broytingin av tíðarfreistini til kl. 9 bæði kann tulkast til at vera kl. 9:00 á morgni og kl. 21:00 á kvøldið. J&K Petersen ger galdandi, at freistin er ógreið, og at tað er Landsverk, sum einsamalt hevur ræðið á mátanum og forminum, sum nýggja freistin var ásett í, og at tað tí er Landsverk, ið eigur at bera váðan fyri, at umsóknir koma inn aftaná, at freistin er farin. Hetta eigur, sambært J&K Petersen, at koma J&K Petersen til góðar, og at umsóknin tí verður at meta sum móttikin rættstundis.

J&K Petersen vísir víðari á, at Landsverk í øllum førum partvíst hevur ábyrgdina av, at henda støðan íkom, tí stovnurin ikki hevur verið varugur við, at upprunaliga ásetta freistin var ein heiligdag.
J&K Petersen metir, at reglan um útihýsan av ov seint innkomnum umsóknum í undangóðkenningarskrivinum sambært orðaljóðinum, bert var galdandi fyri tað fyrst ásettu freistina. Tá Landsverk broytti upprunaligu freistásetingina, varð onki tilskilað um, at umsóknir, sum vórðu latnar inn ov seint, ikki vórðu tiknar við til metingar, eins og ásett í upprunaliga undangóðkenningarskrivinum. J&K Petersen er ikki av teirri fatan, at Landsverk greitt hevur tilskilað, at avleiðingarnar av, at umsóknir, sum vórðu latnar inn ov seint blivu útihýstar frá meting.
J&K Petersen vísir á, at tá ongar lógarásetingar eru viðvíkjandi undangóðkenningartilgongdini, og at Landsverk ikki hevur kunnað um avleiðingarnar av, at umsókn varð latin ov seint inn í sambandi við broyttu tíðarfreistina, eigur Fíggjarmálaráðið at leggja til grund meginregluna um, at ógreiðar treytir eiga at koma Landsverki til bága, og tískil eigur freistin 17. mai 2021 ikki at fáa útihýsandi virknað fyri J&K Petersen.

J&K Petersen metir ikki, at undangóðkenningarskrivið frá 14. apríl 2021, og broytingarnar av freistini eru sonevnt útbjóðingartilfar. Sambært J&K Petersen eru undangóðkenningar ein sundurskildur partur av útboðsmannagongdini, sum onki hevur við útbjóðingina at gera, og tí eru undangóðkenningar heldur ikki fevndar av reglunum um útbjóðing. Tá henda kæran snýr seg um eina undangóðkenning, metir J&K Petersen heldur ikki, at løgtingslóg um útbjóðing er viðkomandi fyri kæruna, tí lógin sigur onki um, hvussu ein undangóðkenning skal skipast. Lógin gevur heldur ikki Landsverki heimild til at nokta at taka ímóti tilboði frá J&K Petersen, bert við einari tilvísing um, at felagið ikki var undangóðkent sambært freistmannagongdunum hjá Landsverki.

J&K Petersen greiður frá, at í sambandi við undangóðkenningar eru ongar ítøkiligar lógarásettar reglur galdandi. J&K Petersen greiður víðari á, at viðmerkingarnar hjá Landsverki í stóran mun byggja á "eina grundleysa samanrenning av hugtøkunum undangóðkenning, ið *ikki* er lógarásett, og útbjóðing, ið *er* lógarásett."
Tískil ger J&K Petersen galdandi, at Landsverk eigur at meta um ítøkiliga málið, sum í hesum førinum er tíðspunktið, tá umsóknin varð latin inn. Víst verður á, at ein fyrisitingarligur myndugleiki ikki uttan serstaka lógarheimild kann síggja burtur frá ítøkiliga viðkomandi og sakligum atlitum; heldur ikki, tá talan er um freistir. Tí átti Landsverk at gjørt eina ítøkiliga meting av umsóknini, áðrenn hon bleiv burturvíst.

Landsverk er ikki samt við J&K Petersen í hesum og vísir á, at:

*"Undangóðkenning er partur av samlaðu útboðsmannagongdini og ein óloysandi partur av útboðsmannagongdini sum skal bera í sær at endaligur sáttmáli um nýgerð av Fámjinstunnli verður undirritaður."*

Harumframt metir Landsverk, at undangóðkenningin og umsóknirnar eru eina óloysandi partur av sjálvum útboðnum og endaliga sjálvum sáttmálanum. Sambært Landsverki byrjar kappingin við undangóðkenningarmannagongdini. Tískil metir Landsverk seg ikki hava aðrar møguleikar enn at burturvísa umsóknina frá J&K Petersen, vísandi til at:

*"Landsverk kann ikki sum almennur myndugleiki viðgera eins støður ymiskt, alt eftir hvør tað er, havandi í huga, at aðrir arbeiðstakarar hava hildið seg til karmarnar, ið eru ásettir í undangóðkenningini. Afturat hesum er tann aðalreglan alment galdandi, at tann sum ikki yvirheldur ásettar freistir í eini undangóðkenning ella útboðið, missur møguleikan at luttaka um hetta er nágreina í útboðstilfarinum."*

Landsverk greiðir frá, at stovnurin í eina tíð hevur nýtt samskiftispallin, iBinder, í sambandi við undangóðkenningar og útboð, umframt at Landsverk hevur latið gjørt ein frymil til sama endamálið. Hesin frymilin verður m.a. nýttur til mannagongdir í sambandi við umsóknir, útboð og avleiðingar av, at umsókn verður latin inn eftir, at tíðarfreistin er farin. Hetta er fyri at tryggja ávísar aðalreglur og trúvirðið hjá stovninum. Skipanin hevur, sambært Landsverki, verið nógv brúkt og uttan, at trupulleikar hava staðist av hesum.

Til hetta vísir J&K Petersen á, at tá talan er um eina undangóðkenning, so er henda tilgongdin undirløgd vanligum fyrisitingarligum reglum. Hesar reglur áseta, at ein fyrisitingarligur myndugleiki hevur skyldu til at inndraga øll saklig atlit, áðrenn avgerð verður tikin. Tað metir J&K Petersen ikki, at Landsverk hevur gjørt í hesum førinum. J&K Petersen metir heldur ikki, at Landsverk bert kann styðja seg til grundgevingina um, at freistin fyri at lata umsókn um undangóðkenning var farin, og at stovnurin tískil ikki kundi viðgera umsóknina orsakað av, at hetta hevði verið í stríð við líkheitsregluna.

*Endurgjald*
Í undangóðkenningarskrivum og útboðsskrivum hjá Landsverki verður stórur dentur lagdur á, at freistir og innlatingarstaður verða hildnar, og at hesi krøv eru at meta sum minstu krøv til umsøkjara ella tilboðsgevara. Um hesi krøv ikki verða lokin, merkir hetta, at ein møgulig umsókn ella møguligt tilboð ikki verður tikið við í meting. Landsverk leggur áherðslu á, at

henda mannagongdin er siðvenja hjá stovninum, og at tey hava dømi um, at umsóknir og tilboð ikki eru tikin við í meting orsakað av ov seinari innlating ella at innlatingin fór fram á skeivum staði. Sambært Landsverki kann stovnurin verða møttur við einum endurgjaldskravi, um stovnurin tekur eitt tilboð inn, sum er latið inn ov seint ella er latið inn á skeivum staði. Landsverk vísir á, at hetta er føst siðvenja innan útboðsrættin, og tí fylgir stovnurin teimum aðalreglum, sum eru galdandi og stýrandi innan fyri útboðsrættin.

Landsverk vísir á, at í hesum føri, har talan er um ein professionellan umsøkjara, sum er vanur at gera brúk av iBinder, er tað umsøkjarin sum hevur ábyrgdina av at halda tey minstu krøv, sum Landsverk hevur sett. Landsverk vísir víðari á, at J&K Petersen hevur viðgingið, at talan var um ein menniskjaligan feil, sum felagið tí eigur ábyrgdina av.

J&K Petersen vísir á, at hetta kærumálið ikki skal viðgerast eftir reglunum um útbjóðing, tí talan er ikki um eina útbjóðing, men um eina undangóðkenning. Tí er spurningurin um endurgjald ikki av týdningi fyri málið. Harafturat hevur Landsverk ikki víst á nakra ítøkiliga umsókn, sum ikki er tikin við í meting, orsakað av, at hon var latin inn ov seint ella á skeivum staði.

*Kapping*
Sambært Landsverki eru tríggjar umsóknir komnar inn til undangóðkenningina, og allar umsóknirnar lúka treytirnar, sum Landsverk hevur sett í sambandi við undangóðkenningina. Sostatt kunnu hesar fyritøkur geva tilboð uppá nýggjan tunnil til Fámjins. Landsverk metir, at við trimum skikkaðum umsøkjarum, er talan um nøktandi kapping, bæði viðvíkjandi prísi og góðsku. Landsverk vísir á, at hetta verður eisini staðfest í løgtingslóg um útbjóðing.

J&K Petersen vísir á, endamálið við einari undangóðkenning er m.a. at fáa so nógvar skikkaðar umsøkjarar sum møguligt, fyri at Landsverk hevur fleiri at velja ímillum, soleiðis at Landsverk fær sum mest fyri peningin.

*Privatrættarliga øki*
Landsverk vísir í viðmerkingunum á, at hetta økið hjá Landsverki er partur av tí privatrættarliga økinum. Hetta hevur við sær, at sum høvuðsregla er ongin lógarásettur kærumøguleiki. Orsakað av hesum mælir Landsverk Fíggjarmálaráðnum til at vísa kærumálið frá sær.
Landsverk vísir á tvey álit, har Løgtingsins umboðsmaður hevur staðfest, at eginrættarligar gerðir (privatrættarligar dispositiónir) fella uttanfyri avgerðarthugtakið sambært fyrisitingarlógini, og at fyrisitingarlógin ikki er galdandi í málum um útbjóðing. Sambært Landsverki leggur stovnurin stóran dent á aðalreglurnar, líkareglan og gjøgnumskygni, sum eru berandi innanfyri útboðsrættin, og sum eru viðvirkandi til, at allir umsøkjarar fáa somu viðgerð, tá tað kemur til tilfar, treytir og freistir.

J&K Petersen er ósamt við Landsverki í, at talan er um økið, sum er partur av tí privatrættarliga økinum. J&K Petersen metir ikki, at grundgevingin og orsøkin fyri, at økið skal fella uttan fyri fyrisitingarlógina er nóg væl lýst.
Sambært J&K Petersen eru avleiðingarnar av, at umsóknin verður útihýst, stórar fyri felagið, og orsakað av viðmerkingunum hjá Landsverki um, at ongin lógarásettur kærumøguleiki er til staðar, mæla teir til, at hetta ikki fær týdning fyri málið.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

*Grundgeving fyri avgerðini*
Sambært § 1 fevnir løgtingslóg nr. 106 frá 15. november 1984 um útbjóðing v.m. um innheinting av boðum uppá arbeiðir og veitingar innan byggivirksemi, tó skipabygging undantikin. Í § 2 verður lýst, hvat ein útbjóðing er. Undangóðkenningar eru ikki nevndar í ásetingunum í lógini.
Tí metir Fíggjarmálaráðið, at løgtingslóg um útbjóðing v.m. er galdandi fyri útbjóðingar, og at undangóðkenningar ikki eru fevndar av lógini.

Tað eru heldur ongar aðrar ítøkiligar lógarásetingar galdandi í sambandi við eina undangóðkenning. Fíggjarmálaráðið metir tí, at tann parturin, sum snýr seg um undangóðkenning er fevndur av fyrisitingarliga partinum hjá Landsverki, og tí hevur Fíggjarmálaráðið viðgjørt kæruna frá J&K Petersen.

Landsverk hevur í sínum viðmerkingum víst á tvey álit frá Løgtingsins umboðsmanni viðvíkjandi eginrættarligum gerðum (privatrættarligar dispositiónir) hjá tveimum kommunum. Bæði álitini viðvíkja tó útbjóðingum og ikki, sum í hesum føri, einari undangóðkenning. Álitini viðgera ikki spurningum um, hvørt ein *undangóðkenning* er ein eginrættarlig gerð ella ikki, og tí metir Fíggjarmálaráðið ikki, álitini kunnu sammetast við hetta ítøkiliga málið.

Ítøkiliga snýr kæran seg um, at Landsverk broytti tíðarfreistina fyri, nær umsókn um undangóðkenning skuldi verða latin inn.

Landsverk valdi at broyta upprunaliga ásettu tíðarfreistina, tá stovnurin bleiv varugur við, at henda tíðarfreistin fall á ein hósdag kl. 14:00, sum var ein heiligdagur. Landsverk avgjørdi tí at leingja freistina til mánamorgun kl. 9. Hetta bleiv gjørt inni á iBinder, sum er samskiftispallurin hjá Landsverki. J&K Petersen varnast ikki, at tað ikki bara er dagurin, sum er broyttur, men at tíðin eisini er broytt. J&K Petersen hevur víst á, at tíðarfreistin ikki bleiv víst eins týðuliga á iBinder sum í undangóðkenningartilfarinum hjá Landsverki, har hetta varð skrivað við størri skrift og markerað. J&K Petersen sendir tí av misgáum umsóknina inn 2 tímar ov seint.

Fíggjarmálaráðið er av teirri fatan, at J&K Petersen ikki hevur kunnað seg nóg væl um nýggju tíðarfreistirnar, og orsakað av hesum hevur fyritøkan latið umsóknina inn ov seint. Hinvegin hevur nýggja freistásetingin hjá Landsverki elvt til misskiljingar, og hetta hevur víst seg at vera beinleiðis orsøk til, at J&K Petersen hevur latið umsóknina inn ov seint.

Samanumtikið metir Fíggjarmálaráðið, at talan er um eina tíðarfreist, sum ikki er lógarásett, tí málið snýr seg um eina undangóðkenning, ið ikki fevnd av løgtingslóg um útbjóðing v.m. Broytingin av tíðarfreistini er beinleiðis orsøk til, at misskiljingar íkoma. Hetta hevur við sær, at ein umsókn til undangóðkenning verður latin inn ov seint.
Niðurstøðan hjá Fíggjarmálaráðnum er tí, at Landsverk er nærmast at bera váðan fyri íkomnu støðuna.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

Ministry of Finance

Vísandi til omanfyri nevnda verður avgerðin hjá Landsverki ógildað. Fíggjarmálaráðið heitir tí á Landsverk um at áseta eina nýggja tíðarfreist, har Landsverk samstundis heitir á fyritøkur um at blíva undangóðkendar av nýggjum í sambandi við Fámjinstunnilin.

Henda avgerðin er endalig innan fyri fyrisitingina og kann ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

Tinganes, 15. juli 2021

Bjarni Askham Bjarnason
aðalstjóri

Annika Poulsen
fulltrúi